Kyndil-VB 23-25 (12-15):

# VB tók av møguleikanum

**Í einum spennandi dysti í Ítróttarhøllini á Hálsi vóru vágskvinnurnar tað lítla pettið kaldari, sum gjørdi, at tær aftur hesa ferð fingu fulla úrtøku**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

VB er framvegis oddaliðið í bestu føroysku kvinnudeildini í hondbólti, og enn hava tær fult stigatal. Somikið einføld er niðurstøðan eftir dystin millum Kyndil og VB.

Tað varð annars tosað um undan dystinum, at hetta helst kundi gerast ein av teimum heilt truplu hjá VB, og tó at hetta eisini helt stikk í so máta, so megnaðu tær enn einaferð at fáa fulla úrtøku.

Tað tóktist annars longu frá byrjan greitt, at VB undir ongum umstøðum skuldi rokna við nøkrum løttum dysti. Kyndil hevði veruliga gjørt seg til, nú oddaliðið kom á vitjan. Í mun til tapið fyri Tjaldrinum v´rou bæði Annika Ljósstein og Annika Thomsen nú aftur tøkar – hóast hetta ikki var upprunaliga ætlanin – og so hevði liðið nú loksins fingið jugoslavisku Sonju Smiljic til landið.

Hjá VB var støðan hinvegin tann sama, sum hon var fyri einari viku síðani. Arnleyg Hjelm er framvegis ikki tøk, og tað merkir so, at størri partur av byrðuni verður løgd á aðrar leikarar. Eitt nú á Mary og Eyðbritt Krosslá, sum annars als ikki høvdu ætlanir um at spæla í ár.

Og tað var eisini Kyndil, sum setti dagsskránna fyrstu løtuna. Kanska var spælið eitt sindur trilvandi hjá báðum pørtum fyrstu løtuna. Liðini tóktust hava stóra virðing fyri hvørjum øðrum, og størsti denturin varð lagdur á verjuspælið, fyri síðani at dúva upp á kontra, og hesum hevði VB betri hepni við, men tá glið so kom á spælið, so var tað Kyndil, sum legði fyri. Kanska spældi liðið sínar bestu tíggju minuttir í ár miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og fýra mál á rað togaðu tær fram um VB, áðrenn eitt time-out frá beinkinum fekk oddaliðið upp aftur á rættkjøl.

Og so byrjaði VB aftur at toga. Eins og tað hevur verið gjørt í hinum dystunum, so vóru tað serliga tær báðar, Daiva og Reda, sum spælið koyrdi uppá, men hóast hesar vóru altdominerandi í málskjótingini, so hoyrir tað eisini við til søguna, at hinar á liðnum hildu seg 100% til avráddu spæliætlanina. Gjøgnumbrotini vóru nógv í tali, og var tað ikki fyri eina sera væl leikandi Fríðu Petersen í málinum, so var VB leiðslan helst væl meira enn tey trý málini, sum vóru á muni í steðginum.



*Hóast Kyndil serliga í seinna hálvleiki rosyndi at ansa betur eftir útlendsku leikarunum hjá VB, so eydnaðist hetta ongantíð, og serliga høvdu tær grønu ilt við at halda kviku og gjøgnumbrotssterku Redu Kurkaliskiene frá málskjótingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Loynivápnið mundi riggað

Í seinna hálvleiki var leingi líkt til, at nú skuldi VB koyra sigurin heim uttan stórvegis toks. Kyndil roysndi nú í størrio mun at ansa eftir teimum báðum útlendsku, men tað var misjavnt, hvussu væl hetta eydnaðist. Ikki minst tí Reda men teljast millum gjøgnumbrotssterkastu leikararnar í landinum, eins og Daiva hevur eitt sera lúmskt skot. Heldur ikki tá tær eina løtu vóru tvær í yvirtali megnaði Kyndil at seta nóg nógv trýst á, og so við og við fánaði dirvið, sum annars tóktist stórt fyrstu løtuna eftir steðgin.

Javnt og samt økti VB um minin, og tá hálvleikurin var um at vera hálvrunnin, tóktist alt mest sum avgjørt, men so gjørdi Kyndils-venjarin av at nýta sítt seinasta vápn.

Jugoslaviska Sonja Smiljic kundi helst ynskt sær eina betri byrjan upp á Føroya-ferð sína, enn hana hon fekk um Leirvíksfjørð sunnumorgunin, men hóast hetta, so sýndi hon mest sum alt fyri eitt, at hon helst fer at gerast góður fongur hjá Kyndli. Tríggjar ferðir á rað sendi hon bóltin í meskarnar, og so var Kyndil brádliga við aftur í dystinum.

VB roysndi tó at svara aftur, men spenningurin vardi allan dystin. Fimm minuttir fyri leiklok hevði Kyndil minkað niður í eitt mál. VB svaraði aftur, men tá Reda so fekk reyða kortið fyri at hava provokera dómaran, sá brádliga svart út, men jús tí røttu løtuni progvaði hin Daiva akkurát hvat málverjar eru til fyri. Fram til tá hevði hon eins og vant staðið ein góðan dyst, men tá tað so veruliga stóð á, togaði hon veruliga stórspælið fram. Tvey brotskøst á rað vórðu brend frá Kyndli, umframt at aðrar bjargingar vórðu togaðar fram, og so gjørdi tað hóast alt einki, at VB ikki skoraði hesar tríggjar seinastu minuttirnar. Kyndil slapp ikki at teimum, og tá seinasta bríkslið hevði ljóðað, var fagnaðurin skilligur. Enn ein trupul dystur hevði kastað fult av sær, og framvegis er VB á odda við fullum stigatali.

### Týðandi dygdir

Og tað er sumt, sum bendir á, at VB í ár ætlar sær at roynast drúgvari á tindinum, enn tær ofta hava gjørt áður. Stríðsviljan hava tær altíð havt, og hann er einki minkaður í so máta.

At tær framvegis megna ferðmiklan kontrahondbólt – sum ofta hevur verið teirra vørumerki – fekk Kyndil so sanniliga eisini at kenna, og so tykist liðið í ár at hava funnnið júst tann týdningarmikla neyvleikan í avgerndi løtunum. Júst hesin eginleiki hevur annars verið nakað, sum VB hevur saknað seinnu árini, har liðið mest sum hvørja ferð dró styttra stráðið í jøvnum uppgerðum. Nú tykist vent í so máta. VÍF, Neistin og Kyndil eru øll koppað í tøttum dystum, har seinastu løturnar hava verið avgerandi. Ein dygd, sum kann vísa seg at verða gull verd, men enn er kanska dekan ov tíðliga at staðfesta slíkt. Fyri fyrst ræður tað dystin móti StIF, har VB má vera Redu fyri uttan, men við vanliga stríðsviljanum hjá liðnum, so er hendan forðingin heldur ikki nakað, sum kann ræða.

**Dysturin í tølum:**
**Kyndil-VB 25-27 (12-15):**
Málskjúttar:
Kyndil: Ileana Manolescu 5, Heidi Maria Akselsen 5, Lotte Sørensen 5(2), Sonja Smiljic 3, Annika Thomsen 3, Marjun Tróndarson 2, Ann Hansen 2
VB: Daiva Toumaite 13(3), Reda Kurkaliskiene(1) 10, Laila Jespersen 2, Eyðbritt Krosslá 1, Eydis Kjærbo 1
Brotskøst: Kyndil 5, VB 7
Útvísingar: Kyndil 3, VB 5
Diskvalifikatión: VB 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 5 - 0 - 0 | 122 | 99 | 23 | 10 |
| 2 | VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 117 | 104 | 13 | 6 |
| 3 | Neistin | 5 | 2 - 1 - 2 | 99 | 97 | 2 | 5 |
| 4 | Kyndil | 5 | 2 - 0 - 3 | 132 | 123 | 9 | 4 |
| 5 | StÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 101 | 110 | -9 | 4 |
| 6 | Stjørnan | 5 | 1 - 1 - 3 | 96 | 105 | -9 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 1 - 0 - 4 | 102 | 131 | -29 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 5 | 4 - 0 - 1 | 141 | 122 | 19 | 8 |
| 2 | VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 149 | 124 | 25 | 6 |
| 3 | Kyndil | 4 | 3 - 0 - 1 | 118 | 99 | 19 | 6 |
| 4 | StÍF | 4 | 3 - 0 - 1 | 120 | 104 | 16 | 6 |
| 5 | H71 | 5 | 2 - 0 - 3 | 115 | 132 | -17 | 4 |
| 6 | KÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 90 | 101 | -11 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 119 | 170 | -51 | 0 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 3 | 2 - 1 | 8 | 4 | 4 | 4 |
| 2 | Dráttur | 2 | 2 - 0 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| 3 | Mjølnir | 3 | 2 - 1 | 7 | 5 | 2 | 4 |
| 4 | ÍF | 2 | 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 2 |
| 5 | KÍF | 2 | 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |
| 6 | Fleyr | 2 | 0 - 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 3 | 3 - 0 | 9 | 0 | 9 | 6 |
| 2 | Fram | 2 | 1 - 1 | 4 | 3 | 1 | 2 |
| 3 | Mjølnir | 2 | 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 2 |
| 4 | SÍ | 3 | 1 - 2 | 3 | 6 | -3 | 2 |
| 5 | Fleyr | 2 | 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |



Stjørnan-VÍF 16-20 (7-7):

# So kom gongd á VÍF

**Hóast tær máttu vera Soley Mikkelsen fyriuttan, so reistist VÍF í Klaksvík, tá tær seinasta korterið runnu frá Stjørnuni í einum annars jøvnum dysti**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinnu árini hava tað júst verið VÍF og Stjørnan, sum hava myndað oddin í føroyskum kvinnuhondbólti, men í ár tykist okkurt at vera broytt í so máta. Stjørnan hevur als ikki sama fólk at taka av, sum fyri trimum árum síðani gjørdu tær til besta liðið í landinum, og tó at nógv aftur í ár roknaðu VÍF sum favoritt undan kappingini, so hava úrslitini víst, at tær í øllum førum ikki skulu rokna við at fáa serliga lætt spæl í ár.

Longu tvær ferðir hetta árið hava tær tapt landskappingardyst, og tað er sum so meira, enn tær hava tapt seinatu tvey árini, og tí var talan í nógvar mátar um ein avgerandi dyst fyri VÍF, skuldi sambandið við oddin ikki slitna fullkomuliga.



*Jacklin Durhuus tók leiklutin sum málskjútti á seg, tá VÍF loksins reisti seg og fekk fulla úrtku í trupla útidystinum í Klaksvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Uttan Sóley

Tí var tað helst eisini ein dyggur smeitur, at VÍF mátti vera ein av mest týðandi leikanum fyriuttan, tá Sóley Mikkelsen ikki sá seg føra fyri at spæla, og í staðin mátti taka sæti við síðuna av Daniel og Ioanau Rápa á beinkinum. Undir øllum umstøðum gjørdi hetta fortreytirnar verri undan dystinum, og leingi var eisini líkt til, at Stjørnan skuldi geva VÍF ein heilt skarpan gang.

Somikið hart spentar vóru vestmannakvinnurnar, at fyrstu trý korterini var millum lítil og eingin munur á liðunum. Serliga í fyrra hálvleiki tóktis tað heldur so, at Stjørnan var við yvirlutan, men VÍF slepti ongan tíð takinum, og í seinna gav hetta at bíta. Venjingarstøðan hjá gestunum var snøgt sagt eitt vet betri enn hjá heimaliðnum, og so við og við fánaði spælið hjá Stjørnuni. Agne Masenaite megnaði ikki einsamøll at standa ímóti trýstinum, og so skrædnaði seinastu løtuna, tá VÍF eitt langt skifti skoraði átta ferðir, meðan Stjørnan bert fekk eitt mál.

Sostatt fekk VÍF loksins aftur ein sigur á kontina, men enn tykjast tær ikki sannførandi í stríðnum um heiðursmerki. Hinvegin sýndi avrikið, at venjingarstøðan hjá leikarunum er um at vera har, sum hon eigur at vera, og júst hetta hevur seinnu árini verið ein av høvuðsorsøkunum fyri góðu avrikunum. Hvørt hetta so er nóg mikið til ein sess heilt frammi í oddinum, er fyribils ein ósvaraður spurningur, og partvíst verður hesin kanska svaraður, tá tær um eina viku taka ímóti Kyndli í einum dysti, sum longu nú er farin at líkjast einum fyribils farvæl til eitt av teimum liðum, sum undan kappingini vórðu roknað sum eitt gott boð til ein oddasess.

Her verður tað neyvan, at Stjørnan fer at halda til, men hóast tað, so hevur liðið higartil sýnt, at tær væl kunnu spæla upp til tey sterkastu liðini. Enn hevur úrtøkan tó ikki verið til fleiri enn trý stig, men halda tær á fram við sama treysti, so er einki at ivast í, at stigini so líðandi fara at koma, og higartil hevur talan verið um ein javna kapping, so tað er kanska ikki heilt óhugsandi, at tær fara at ota seg longur upp á stigatalvuna, sum árið líður.

**Dysturin í tølum**
**Stjørnan-VÍF 16-20 (7-7)**
Málskjúttar
Stjørnan: Danijela Ercevic 6(2), Natasja Stamencovic 6(2), Una Olsen 2, Súsanna Hansen 1, Jastrid Gullaksen 1, Gunnvør Isaksen 1
VÍF: Jacklin Durhuus 8(2), Nicoleta Radu 4(1), Hertha Simonsen 3, Fríða Marjunardóttir 3(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Jóna Jógvansdóttir 1
Brotskøst: Stjørnan 6, VÍF 6
Útvísingar: Stjørnan 3, VÍF 3
Dómarar úr StÍF: Alexander Johansen & Marian Cirliganescu

Fleyr - ÍF 0 - 3 (15-25)(17-25)(17-25):

# Einasta úrslitið

**Í einasta flogbóltsdystinum í meistaradeildini um vikuskiftið vann ÍF tryggan sigur á Fleyr**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Illveðrið sunnudagin viðførdi, at bert ein flogbóltsdystur varð leiktur sunnudagin. Hesin var millum Fleyr og ÍF, har útiliðið ikki hevði fyri neyðini at sigla til dystin, og tó at tað helst hevur verið nakað illfýsið á vegnum, so tóktist hetta á ongan hátt at nerva fuglfirðingarnar, sum greitt greiddu sína skyldu móti Fleyr.

Sum tað kundi roknast við, so var alla tíðina munur á teimum báðum liðunum, sum hava lagt seg í hvør sín enda á stigatalvuni, og tó at Fleyr roysndi at muta ímóti, so var mótstøðan snøgt sagt alt ov sterk.

Sum sagt, so viðførdi illveðrið, at allir hinir dystirnir í meistaradeildunum máttu útsetast. Ein dystur skuldi vera í Havn millum kvinnuliðini hjá KÍF og TB, og í Klaksvík skuldi Mjølnir spæla móti Drátti. Somuleiðis skuldu menninir hjá Mjølni og SÍ, men nú má FBF so finna nýggja dagfesting til hesar tríggjar dystirnar.

Kyndil-H71 28-21 (12-12):

# Trupul favoritt-sigur

**Kyndil fekk væntaða sigurin á H71, men spælið var langt ífrá nakað, sum sannførdi um, at talan helst var um eitt av oddaliðunum í hesum kappingarárinum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hoyvíkingar vóru illa sperdir, tá teir sunudagin komu í Ítróttarhøllina á Hálsi. Tveir av mest týðandi leikarunum hjá liðnum, Bárður Brimvík og Halgir Dahl-Olesen, skudlu koma við sunnudagsflogfarinum, men vánaliga veðrið viðførdi, at teir báðir ikki vóru tøkir til dystin.

Var Kyndil favorittur undan hesum, so gjørdist leikluturin ikki minni eftir hetta, og tó at alt tóktist ganga sum ætlað fyrstu løtuna, so máttu teir grønu tó ásanna, at sigurin kemur ikki av sær sjálvum.

### Argaðu leingi

Eftir eina heldur ógvusliga byrjan frá teimum grønu so var tað nevnliga so, at hovyíkingarnir leingi argaðu Kyndil. Við kontantum verjuspælið roysndu teir at steðga kyndilsleikarunum, áðrenn støðurnar gjørdust alt ov vandamiklar, fyri síðani at dúva upp á kontraálopini. Og tá teir hjá Kyndli als ikki tóktust hava fatað, at teir kundu verða noyddir at stríðast fyri stigunum, so vóru hoyvíkingar brádliga við aftur í dystinum.

At Kyndil illneitaðist inn á hetta, kom eisini til sjóndar, tá Hanus Jensen fekk reyða kortið fyri at gera seg inn á Jákup á Borg beint fyri steðgin, men samstundis var hetta helst nakað, sum fekk teir grønu at ásanna, at teir máttu taka annað skinn um bak.

Í øllum førum var talan um heilt øðrvísi dyst, tá liðini komu útaftur. Kyndil var nú spælstýrandi alt fyri eitt, og tó at tlaan ongan tíð um gjørdist um nakra niðurspæling av mótstøðuni, so framdu teir ikki sama mistakið aftur. Sigurin varð koyrdur heim uttan stórvegis trupulleikar, og soleiðis er Kyndil framvegis við í oddastríðnum.

### Skal meira til

Tað er tó eingin loyna, at annað og betri spæl skal til, um Kyndil skal gera sær vónir um at halda fast um hesa støðu. Longu mikudagin skulu teir aftur í eldin, tá staðið er Vestmanna og mótstøðuliðið er eitt sært VÍF lið, sum longu nú hevur tapt tvær ferðir, og sum ivaleyst fer at leggja nógv fyri í royndunum at forða triðja tapinum.

**Dysturin í tølum:**
**Kyndil-H71 28-21 (12-12)**
Málskjúttar:
Kyndil: Finnur Hansson 8(1), Jacob Jónsson 6(1), Rúni Mohr 3, Ken Zachariasen 3, Regin Johannesen 3(1), Hanus Jensen 2, Heini Bendtsen 2, Høgni Klein 1
H71: Johnny Djurhuss 7(3), Niels Viggo Niclasen 7, Jákup á Borg 2, Anfinn N. Debes 2, Høgni M. Joensen 1
Brotskøst: Kyndil 6, H71 3
Útvísingar: Kyndil 2, H71 3
Diskvalifikatión: Kyndil 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen.



*Lingi hevði H71 got ttak á og argaði Kyndil, men í seinna hálvleiki kom munurin millum liðini til sjóndar, so Kyndil fekk koyrt ein hóast alt tryggan sigur heim*

*Mynd: Álvur Haraldsen*